# Løgmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 31.10.2025 |
| Mál nr.: | 23/16377 |
| Málsviðgjørt: | HP |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning, framleiðslu og sølu av rúsdrekka (Rúsdrekkalógin)**
(Heimild til at loyva umsøkjarum við skeinkiloyvi at innflyta rúsdrekka)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 111 frá 20. oktober 2023 um innflutning, framleiðslu og sølu av rúsdrekka (Rúsdrekkalógin) verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2, stk. 2 verður aftan á "upp um 2,8" sett: "ella spritt ella løgur, sum ikki er drekkiligur og bert ætlaður til reinføri ella tílíkt".

**2.** Í § 7 verða sum stk. 2-4 sett:
"*Stk. 2.* Loyvisnevndin, sambært § 8 í matstovulógini, kann loyva umsøkjarum við skeinkiloyvi at innflyta rúsdrekka og kann seta treytir í hesum sambandi.
*Stk. 3.*Vøra, ið verður innflutt eftir stk. 2, kann bert skeinkjast á skeinkiloyvisstaðnum.
*Stk. 4.* Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um innflutningsloyvi eftir stk. 2.".

**3.** Í § 9, stk. 3, 1. pkt. verður aftan á "Rúsdrekkasølu Landsins" sett: "ella skeinkiloyvishavara"

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í samgonguskjalinum er semja um, at matstovuvinnan skal hava møguleika fyri at innflyta vín og øl beinleiðis til landið. Ferða- og matstovuvinnan hevur sóknast eftir at kunna innflyta rúsdrekka beinleiðis, og hevur í hesum sambandi borið fram, at ein slík heimild fer at gera tað lættari hjá vinnuni at veita kundum og ferðafólki eina betri tænastu.

Rúsdrekkasøla verður eftir broytingina skipað eins og í dag við einkarsølu. Mett verður tó, at endamálið við at tálma nýtsluni verður rokkið eins væl, um einkarrætturin at innflyta og selja rúsdrekka avmarkar seg til brúkaran og ikki umfatar skeinkiloyvishavarar.

Tað ávirkar ikki atkomuligheitina og nýtsluna, um Rúsdrekkasøla Landsins, sum er ein almennur stovnur, ikki er eitt kravt millumlið, tá talan er um sølu til skeinkiloyvishavarar, tvs. millum vinnukundar. Uppskotið er tí ikki avmarkað til øl og vín men fevnir um rættin hjá matstovuvinnuni at selja rúsdrekka sum heild uttan um Rúsdrekkasøluna, so vinna og umsiting ikki verða darvað av óneyðugari umsiting.

Uppskotið skipar betri karmar fyri vinnuna at veita viðskiftafólki betri úrval og góðsku. Gongdin í rúsdrekkanýtsluni, síðan Rúsdrekkasølan lat upp í 1992, gevur ábending um, at betri góðska og úrval ikki føra til meir- ella misnýtslu av rúsdrekka, men at betri úrval og góðska eru fremjandi fyri eina hóvligari nýtslu.

Eisini verður skotið upp at loyva føroyskum rúsdrekkaframleiðarum at selja beinleiðis til matstovur, so lógin ikki ger tað meiri trupult at keypa frá føroyskum enn frá útlendskum framleiðarum.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Sambært galdandi lóggávu er tað sum meginregla Rúsdrekkasøla Landsins, ið hevur einkarætt at innflyta og selja rúsdrekka. Fleiri undantøk eru tó til hesa meginreglu.

Matstovur o.tíl., sum hava skeinkiloyvi, hava loyvi at skeinkja rúsdrekka á skeinkiloyvisstaðnum, og bryggjarí kunnu við loyvi frá Loyvisnevndini í egnum sølubúðum selja sína egnu framleiðslu upp til 5,8 %, eins og tey kunnu innflyta rúsdrekka og ethanol til at nýta í egnari rúsdrekkaframleiðslu.

Eisini kunnu rúsdrekkaframleiðarar selja egna framleiðslu beinleiðis til flogfør og skip í altjóða sigling, til tollfríar sølubúðir á flogvøllinum og til skip í altjóða sigling, og til provianteringsfyritøkur, ið selja proviant til flogfør og skip í altjóða sigling.

Eisini kunnu rúsdrekkaframleiðarar eftir umsókn frá Loyvisnevndini fáa loyvi at bjóða ella selja vitjandi rúsdrekka á framleiðslustaðnum.

Tá talan er um innflutning, er eisini loyvt at innflyta vín, ið er ætlað til altarnýtslu. Persónar, ið hava fylt 18 ár, og sum koma til landið við flogfari ella skipi, kunnu taka við sær rúsdrekka til egna nýtslu eftir reglum, sum eru ásettar í kunngerð. Smbr. § 1 í kunngerð nr. 130 frá 1. desember 2023 um innflutning, framleiðslu og sølu av rúsdrekka, kunnu hesi í sambandi við komu til Føroya innflyta til egna nýtslu, 3 litrar av rúsdrekka frá 22 og til og við 60 rúmprosentum av alkoholi, 9 litrar av víni ella øðrum rúsdrekka við í mesta lagi 22 rúmprosentum av alkoholi, og 10 litrar av øli ella cider.

Í 1996 varð § 2, stk. 2, í rúsdrekkalógini broytt, smbr. løgtingslóg nr. 93 frá 4. juni 1996, við tí ótilætlaðu avleiðing, at tað ikki longur er frítt at selja denaturerað spritt í handlunum, tí tað sambært lógini er at rokna sum rúsdrekka. Skal tað seljast, so má antin rúsdrekkasølan selja tað, ella apoteksverkið eftir reglum ásettar eftir § 4, stk. 2.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Lógaruppskotið hevur til endamáls at loyva umsøkjarum við skeinkiloyvi at bíleggja og innflyta rúsdrekka beinleiðis heldur enn umvegis Rúsdrekkasølu Landsins.

Ætlanin er, at tað verður Loyvisnevndin, ið eftir umsókn letur loyvið og setur treytir í hesum sambandi.

Vøran kann bert skeinkjast á skeinkiloyvisstaðnum ella keypast og innflytast av persóni ella felag við skeinkiloyvi. Smásøla verður sostatt framvegis eins og í dag skipað við einkarsølu gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins.

Skotið verður upp, at Landsstýrið kann áseta nærri reglur um innflutningsloyvi.

Eisini verður skotið upp, at rúsdrekkaframleiðarar í Føroyum kunnu selja beinleiðis til skeinkiloyvishavarar, so til ber at keypa beinleiðis frá føroyskum eins og frá útlendskum framleiðarum.

Rúsdrekkalógin treingir til at dagførast, tí rúsdrekkaframleiðarar seinastu árini eru farnir at framleiða t.d. øl sterkari enn 5,8 % og aðrar sterkari drykkivørur, sum sambært lógini ikki kunnu seljast beinleiðis til skeinkistøð.

Rúsdrekkaframleiðarar kunnu í dag selja egna framleiðslu av rúsdrekka sterkari enn 5,8 % beinleiðis til flogfør og skip í altjóða sigling, til tollfríar sølubúðir á flogvøllinum og til skip í altjóða sigling, og til provianteringsfyritøkur, ið selja proviant til flogfør og skip í altjóða sigling. Mett verður, at tað eins væl kann vera loyvt at selja til føroyskar matstovur, ið ikki eru undir linari eftirliti.

Fleiri treytir skulu verða loknar, áðrenn ein matstova ella skeinkiloyvishavari kann fara undir at flyta inn rúsdrekka, so tryggjað verður, at vøran er undir sama eftirliti, sum tá ið Rúsdrekkasøla Landsins innflytur rúsdrekka.

Umráðandi er at ansa eftir, at óviðkomandi ikki sleppa at vøruni, tí talan er um vøru, sum verður innflutt eftir serligum treytum og við serligum loyvi, og sum ikki kann seljast í vanligari sølu.

Innflutningurin verður skipaður, soleiðis at loyvishavar, sum lúka treytirnar og hava skeinkiloyvi, verða skrásettar at hava heimild at innflyta og tollavgreiða ávís vørunummur eftir vøruskránni hjá TAKS.

Talan er ikki um eina nýggja skipan, tí innflutningurin verður fevndur av teimum innflutningsreglum í toll og avgjaldslóggávuni, ið er galdandi fyri allan innflutning, og sum verður mett at verða nøktandi sum er.

Vøran kann annaðhvørt goymast á goymslu hjá fyritøkuni sjálvari ella á frígoymslu. Verður vøran goymd á frígoymslu, verður hon tollavgreidd, tá ið hon verður tikin út. Verður vøran goymd á goymslu hjá fyritøkuni,verður hon tollavgreidd, tá hon verður flutt av kaiøkinum.

Á goymslum, sum hvørki eru frígoymslur ella á kaiøkinum, skal vøran goymast, soleiðis at óviðkomandi ikki hava atgongd til vøruna. Fyritøkan skal fáa til vega hóskandi goymsluøki, sum kann læsast,og fyritøkan skal hava eina nøktandi goymsluskipan, so tryggjað verður, at samsvar er millum vøruskjøl og vørunøgd.

Fyri føroysku bryggjaríini er galdandi, at tollvaldið hevur eftirlit við bryggingini, goymsluni og útflýggingini, og bryggjaríini hava skyldu til at fylgja øllum krøvum, sum eftirlitið setur um brygging, goymsluhøli, útflýggjan o.a., sbr. kunngerð, nr. 2 frá 13. januar 2020 um innflutning, framleiðslu og útflýgging av rúsdrekka.

Henda sama skipan verður galdandi fyri tær matstovur og skeinkistøð, sum fáa loyvi at innflyta rúsdrekka, og omanfyrinevnda kunngerð verður víðkað samsvarandi, so fyritøkurnar verða undir eftirliti av tollvaldinum.

Eftirlitið verður skipað soleiðis, at tollvaldið við støði í upplýsingum um innflutta vøru, kannar ta innfluttu vørunøgdina og sammetir vørunøgdina við søluskjølini, t.e. hvussu vøran verður seld út aftur av goymsluni.

Loyvisnevndin, sum veitir skeinkiloyvi, hevur heimild at geva føroysku bryggjaríunum loyvi at útflýggja egna framleiðslu sína av øli. Henda heimild verður við hesum uppskoti víðkað til eisini at geva matstovum, ið hava skeinkiloyvi, og fyritøkum loyvi at innflyta borðvín.

Nærri reglur um, hvussu Loyvisnevndin viðger slík loyvi, verða ásettar í kunngerð.

Í 1996 varð rúsdrekkalógin broytt – helst av misgáum – so tað ikki longur var loyvt at selja hondspritt í handlunum. Skotið verður upp, at lógin verður broytt, so at spritt, sum ikki er drekkiligt og bert ætlað til reinføri ella tílíkt, eins og fyrr, ikki er fevnt av lógini og tí aftur kann seljast í vanligu handlunum.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Víst verður til: nr. 1.3. Endamálið við uppskotinum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá Føroya Bjór, Oy, Faer Isles Distillery, Ferðavinnufelagnum, Vinnuhúsinum, TAKS, Loyvisnevndini, Heilsumálaráðnum, Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, Fólkaheilsustýrinum, Heilbrigdi, Bláa Krossi, Rúsdrekkasølu Landsins.

Harumframt hevur uppskotið ligið alment frammi á heimasíðuni hjá Umhvørvis- og innlendismálaráðnum í tíðarskeiðinum 31. oktober til 28. november 2025.

Inn komu xx hoyringarsvar. Víst verður til hjálagda upprit um innkomnar viðmerkingar.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Av tí at Rúsdrekkasøla Landsins við uppskotinum missir einkarættin at flyta inn rúsdrekka, fer lógaruppskotið at elva til ein ávísan inntøkumiss fyri Rúsuna. Tað er tó ilt at meta neyvt um, hvussu nógv matstovur framhaldandi fara at innflyta heilt ella partvís gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins, tí mett verður, at Rúsdrekkasølan framvegis verur kappingarfør um hesa tænastu. Hetta tó treytað av, at partur av avlopskravinum verður lagt um til avgjøld, smbr. niðanfyri.

Rúsdrekkasøla Landsins er á fíggjarlógini tengd at einum avlopskravi, ið verður goldið árliga til landskassan. Avlopskravið virkar í verki áleið eins og aðrir tollir og avgjøld. Avlopskravið er fyri fíggjarárið 2025 20.300 t. kr. Hetta er ca. 13,5 % av mettu søluni í 2024 à 148.967 t. kr.

Um loyvt verður privatum feløgum at innflyta rúsdrekka, kunnu hesi sostatt fáa ein fíggjarligan fyrimun, tí hesi ikki eru fevnd av avlopskravinum, men einans skulu gjalda vanligan toll og punktavgjøld. Í sambandi við uppskotið, verður avlopskravið lækkað á fíggjarlógini, so tað samsvarar við eitt vanligt avlop fyri heilsølur, ca. 5 % av søluni. Samstundis verða avgjøldini á rúsdrekka í kapittul 22 í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 72 frá 30. apríl 2025, stillað samsvarandi, so uppskotið ikki ávirkar inntøkur landskassans ella prísstøðið í Rúsdrekkasølu Landsins.

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Loyvisnevndin og tollvaldið skulu sambært lógaruppskotinum ávikavist geva loyvi at innflyta vín og øl og hava eftirlit við, at innflutningurin er í samsvari við reglurnar og tað loyvið, sum er givið.

Kortini verður mett, at hesar uppgávur ikki eru stórar í vavi og at talan tí ikki verður um týðandi umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Fyri vinnuna hevur uppskotið ta avleiðing, at matstovur, sum hava skeinkiloyvi og skeinkistøð, treytað av kravdum loyvum, sjálvar kunnu flyta inn rúsdrekka. Vinnan hevur tá betri møguleikar fyri sjálv at bíleggja beinleiðis frá framleiðarunum, ið verður mett at vera smidligari fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Viðkomandi millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður, at lógaruppskotið er í samsvari við Evropeiska mannarættindasáttmálan, sbr. *Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention* og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sbr. *Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.*

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Revsiásetingin fevnir um brot á broyttu ásetingarnar í løgtingslógini. Revsingin er eins og frammanundan sekt ella fongsul í upp í 4 mánaðir og upp í 1 ár, um talan er um herðandi umstøður.

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Við heimild í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi skulu tey, sum innflyta og framleiða rúsdrekka, rinda landskassanum avgjald fyri ávikavist at framleiða og innflyta rúsdrekka og tilfar til rúsdrekkaframleiðslu. Avgjaldið er ásett í løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 72 frá 30. apríl 2025, í frumskjali 1 til toll- og vøruskránna.

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**

Treytin fyri at innflyta rúsdrekka sambært hesi lóg, er, at innflytarin frammanundan hevur fingið loyvi frá Loyvisnevndini. Henda treyt er grundað á, at neyðugt er við ávísum almennum eftirliti við hesi vinnu, bæði í mun til ta vøru, sum verður seld, í mun til tey avgjøld, sum vinnan skal rinda landinum, og í mun til tær skyldur, m.a. við støði í rúsdrekkapolitikkinum, sum liggja á teimum, ið reka hetta virksemið.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild í kunngerð at áseta reglur um, hvussu matstovur, sum hava skeinkiloyvi, og skeinkistøð kunnu innflyta rúsdrekka.

Aðrar heimildir eru ikki í uppskotinum.

### 2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild í kunngerð at áseta reglur um, hvussu matstovur, sum hava skeinkiloyvi, og skeinkistøð kunnu innflyta rúsdrekka.

Aðrar heimildir eru ikki í uppskotinum.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

### 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1, nr. 1**
Tá ið rúsdrekkalógin kom í 1992 við løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka var í § 7, stk. 2, nr. 1, ásett, at sum rúsdrekka verður ikki roknað løgur, sum ikki er drekkiligur og bert ætlaður til tekniska nýtslu ella kroppsrøkt.

Denaturerað spritt er ikki drekkiligt og bert ætlað til tekniska nýtslu. Tí var tað ikki at roknað sum rúsdrekka sbr. § 2 stk. 2, nr. 1, og kundi tí seljast frítt í handlunum.

Onkuntíð kann tekniskt verða brúk fyri reinum ethanoli yvir 96 %, sum annars er drekkiligt, til tekniska nýtslu. Tað kemur ikki undir § 2, stk. 2, nr. 1, og varð tí at roknað sum rúsdrekka, ið einans Rúsdrekkasølan kann selja. Tí var sett inn heimild í § 4, stk. 2, til við kunngerð at lata apoteksverkið selja reint ethanol til tekniska nýtslu eftir neyvari reglum.

Í 1996 varð § 2, stk. 2, í rúsdrekkalógini broytt, smbr. løgtingslóg nr. 93 frá 4. juni 1996, soleiðis at ásetingin varð soljóðandi: "Sum rúsdrekka verður ikki roknað heilivágur, sum bert er loyvdur apotekum at selja eftir apotekaralóggávuni, hóast hesi hava í sær eitt alkoholrúmprosent, ið fer
upp um 2,8. Sambært løgtingstíðindi 1995, bls. 343, verður denatureráð spritt ikki roknað sum rúsdrekka. (...) Reglurnar samsvara sostatt ikki, og verður tí skotið upp at strika § 2 stk. 2 nr. 1."

Sostatt er broyting gjørd í 1996, við tí ótilætlaðu avleiðing, at tað ikki longur er frítt at selja denatureráð spritt í handlunum, tí tað sambært lógini er at rokna sum rúsdrekka. Skal tað seljast, so má antin rúsdrekkasølan selja tað, ella apoteksverkið eftir reglum ásettar eftir § 4, stk. 2.

Skotið verður upp, at lógin verður broytt, so at spritt ella løgur, sum ikki er drekkiligt og bert ætlað til reinføri ella tílíkt, ikki er fevnt av lógini og tí kann seljast í øllum handlum eins og fyrr.

**Til § 1, nr. 2**
Sambært § 6, stk. 1, hevur Rúsdrekkasøla Landsins einkarætt at innflyta og selja rúsdrekka.

Ásetingin er tó ikki galdandi fyri góðkend framleiðsluvirki, ið innflyta rúsdrekka og ethanol við meira enn 60 rúmprosentum av alkoholi at brúka til rúsdrekkaframleiðslu, smbr. § 4, stk. 1, og fyri innflutning av víni, ætlað til altarnýtslu, smbr. § 7.

Untantak er eisini fyri matstovum og tílíkum, sum hava loyvi til at skeinkja rúsdrekka, og fyri bryggjaríum, sum við loyvi frá Loyvisnevndini kunnu selja egna framleiðslu í sølubúðum og á framleiðslustaðnum.

Ásett verður, at Loyvisnevndin kann loyva umsøkjarum við skeinkiloyvi at innflyta rúsdrekka og kann seta treytir í hesum sambandi.

Ásett verður eisini, at vøra, ið verður innflutt eftir stk. 1, kann bert skeinkjast á skeinkiloyvisstaðnum.

Ásett verður at enda, at landsstýrismaðurin í kunngerð ásetur nærri reglur um innflutningsloyvi eftir stk. 1, undir hesum reglur um goymsluhøli, goymsluskipanir, innaneftirlit, alment eftirlit við goymsluni o.tíl.

**Til § 1, nr. 3**
Sambært galdandi lóggávu er tað sum meginregla Rúsdrekkasøla Landsins, ið hevur einkarætt at innflyta og selja rúsdrekka.

Sambært galdandi lóggávu, kunnu rúsdrekkaframleiðarar bert selja ein part beinleiðis meðan annar partur má seljast umvegis Rúsdrekkasøluna. Hetta verður mett at føra til óneyðugar útreiðslur og umsiting – bæði fyri Rúsdrekkasøluna, framleiðaran og skeinkiloyvishavarar.

Rúsdrekkaframleiðarar eru seinastu árini eru farnir at framleiða øl sterkari enn 5,8 % og aðrar sterkari drykkivørur, t.d. vodka og gin, sum sambært lógini ikki kunnu seljast beinleiðis til skeinkistøð.

Rúsdrekkaframleiðarar kunnu í dag selja egna framleiðslu av rúsdrekka sterkari enn 5,8 % beinleiðis til flogfør og skip í altjóða sigling, til tollfríar sølubúðir á flogvøllinum og til skip í altjóða sigling, og til provianteringsfyritøkur, ið selja proviant til flogfør og skip í altjóða sigling. Mett verður, at tað eins væl kann vera loyvt at selja til føroyskar matstovur, ið ikki eru undir linari eftirliti.

Fyri ikki at gera mismun á føroyskum rúsdrekkaframleiðarum verður tí skotið upp, at føroyskir rúsdrekkaframleiðarar eisini kunnu selja beinleiðis til skeinkiloyvishavarar, so skeinkiloyvishavarar ikki skulu hava størri trupulleikar av at keypa frá føroyskum enn útlendskum framleiðarum.

**Til § 2**
Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Løgmálaráðið, XX.XXXX 2026.

**Bjarni Kárason Petersen**<br>landsstýrismaður

/ Nella Festirstein

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**